Hervør Pálsdóttir
løgtingsmaður

Nr. 77/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um COVID-19 hjálparpakkarnar, settur landsstýrismanninum í vinnu- og umhvørvismálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Kunnu fyritøkur, ið fáa, hava fingið ella kunnu fáa hjálp frá hjálparpakkunum í samband við COVID-19 siga starvsfólk síni upp í sama tíðarskeiði, sum tey fáa almenna hjálp?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er í lagi, at fyritøkur siga starvsfólk upp samstundis sum tær fáa ella kunnu fáa almennan stuðul?

Viðmerkingar:
Heilsukreppan í samband við COVID-19 hevur rakt heimin hart, eisini her í Føroyum. Hjálparpakkar eru gjørdir fyri at hjálpa arbeiðarum og vinnulívinum. Nú frættist, at starvsfólk eru uppsøgd, hóast hjálparpakkar eru gjørdir at hjálpa fyritøkum. Við uppsøgn verða starvsfólkini somuleiðis eisini koyrd úr serligu koronuskipanini í ALS. Hesin fyrispurningur verður settur fyri at kanna, um tað er í lagi at uppsiga starvsfólk, hóast man sum fyritøka hevur rætt til hjálp úr hjálparpakkanum, og hvørja støðu landsstýrismaðurin hevur til tað.

Á Løgtingi, 27. apríl 2020

Hervør Pálsdóttir